## Í fongsul fyri at skemta

Politikarin Otis Hensley frá Kentucky í USA, mátti inn at sita í tríggjar dagar, tí hann hjá grønmetishandlaranum segði eina skemtisøgu, sum ein kundi ikki tók væl upp. Ein kvinna við tveimum vøkrum systirdøtrum, 11 og 13 ára gamlar var til handils, og Hensley segði í skemti, at hann fegin vildi givið kvinnuni ein slaktigrís fyri genturnar. Kvinnan meldaði Otis Hensley, sum tískil mátti tríggjar dagar í fongsul.



## Heimahjálp stjól 100.000

Fleiri eldri í Middelfart hava seinasta hálvaannað árið verið útsett fyri stuldri. Ein 25 ára gomul frá heimahjálpini er nú ákærd av løgregluni á Fjóni fyri 12 stuldrar upp á tilsamans 100.000 krónur. Ein 35 ára gomul røktarheimshjálp er somuleiðis ákærd fyri sjey stuldrar seinastu tríggjar mánaðirnar upp á tilsamans 2500 krónur. Báðar kvinnurnar hava viðgingið stuldurin. Tær eru somuleiðis burturvístar frá teirra arbeiðsplássum í Middelfart Kommune

# r er fremsta lønin



*Her Poul Erik Skov Christensen saman við Sonju Jógvansdóttir, samskipara hjá Samtak*



*Poul Erik Skov Christensen er formaður í 3F, sum er størsta danska fakfelagið við 325.000 limum – bæði faklæddum og ófaklærdum arbeiðarum innan øll yrki. Tað var Samtak, sum hevði bjóðað donsku kanónunum til Føroyar*

### Samanleggingar

Í grannalondunum hava feløgini samstarvað og lagt saman í nógv ár. Hetta hevur higartil bert verið til umrøðu her á landi. Tí hevur tað framvegis ikki eydnast at røkka einari semju um, hvussu hetta møguliga skuldi farið fram. Tað nærmasta vit koma samstarvi, er Samtak, sum er felags skrivstova og heimasíða hjá stóru verkamannafe-løgunum, umframt, at tankar hava verið frammi um at skipa feløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum onkursvegna. Men veruligar samanleggingar, sum 3F ella LO fyri tað, kenna vit onki til. Tí leggja vit fyri við at práta um samanleggingarnar í Danmark. Poul Erik Skov Christensen greiðir frá, at upp gjøgnum nítiárini løgdu fleiri feløg saman og fyri fýra árum síðani tey síðstu KAD og SID, so verkafólk í øllum landinum nú eru savnaði í 3F.

- Limirnir í feløgunum hava somu arbeiðsgevarar, og tí er tað natúrligt, at vit samstarva, samráðast og standa saman á nógvum økjum. Eisini í sambandi við verkføll og tiltøk kunnu vit gagna hvørjum øðrum. Til dømis kann bilførarin í oljubilinum nokta at koyra til eina fyritøku, sum tiltøk eru vend ímóti, sigur Poul Erik Skov Christensen. Hann greiðir víðari frá, at í sambandið við raksturin av feløgunum, er nógvur peningur at spara, tá ið lagt verður saman.

- Vit sóu tað, tá ið tey bæði størstu feløgini hjá okkum løgdu saman til 3F. Rakstrarútreiðslurnar, sum feløgini høvdu staðið fyri hvør í sær, fóru niður í eina helvt longu fyrsta árið, so tað var ein stórur fyrimunur longu har, sigur hann.

Men samstundis hava stórar eindir eisini nýggjar avbjóðingar við sær, eitt nú við at fáa limirnar í talu.

- Tí arbeiða vit nógv við hugtøkum sum opinleika og gjøgnumskygni, tí limirnir skulu kenna á sær, at hóast felagið er stórt, skal tað umboða áhugamálini hjá tí einstaka, sigur hann.

### Tvey greið mál

Fyri framman liggja stórar avbjóðingar hjá verkamannafeløgum í øllum vesturheiminum. Sambært danska fakfelagsleiðaranum eru tvey øki, sum eru avbjóðandi fyri alla rørsluna: Førleikamenning av verkamannafjøldini og arbeiðsumhvørvi. Hesi satsøki hevur 3F sett sær fyri at fokusera serliga upp á til 2015.

Í øllum vesturheiminum minkar eftirspurningurin á ófaklærdari arbeiðsmegi, meðan tørvurin á faklærdum hækkar. Tí eru umskipan og umskúling av arbeiðarafjøldini hugtøk, sum verkamannafeløgini í londunum kring okkum brúka nógva orku uppá – eisini í Danmark.

- Roknað verður við, at í ár 2015 fara 150.000 ófaklærd arbeiðsfólk av arbeiðsmarknaðinum, meðan tørvur er á 150.000 fleiri faklærdum arbeiðarum í Danmark. Umskúla vit ikki fjøldina nú, er stórur vandi fyri, at ófaklærda arbeiðsmegin kemur út á ein sosialan glíðubana og enda á einum síðuspori, sum vit absolutt ikki ynskja fyri limirnar, sigur Poul Erik Skov Christensen.

### Niðurslitin arbeiðsmegi

Í mun til hina avbjóðingina, arbeiðsumhvørvi, greiðir Poul Erik Skov Christensen frá, at allar kanningar vísa, at limir teirra sum heild hava eitt vánaligari lív enn onnur; her verður serliga hugsað um heilsustøðuna hjá fólki.

- Limir okkara eru í størri mun útkoyrdir og niðurslitnir. Tað eru teir, sum standa longs í bíðirøð, fyri at koma til kanningar og viðgerðar í heilsuverkinum. Teir hava lægsta miðallivialdurin, fáa oftast bróstkrabba og hjartasjúkir og fáa oftast fyritíðarpensjón, tí teir verða niðurkoyrdir og útbrendir av stressi og knossi gjøgnum eitt langt og strævið arbeiðslív. Eitt arbeiðslív, har teir millum lítla og onga ávirkan hava á egnan arbeiðsdag, sigur Poul Erik Skov Christensen. Hann metir, at júst hetta við ávirkan og medábyrgd á arbeiðsplássinum, eru lutir, sum skulu raðfestast ovarlaga, skulu fólk ikki brenna út.

Hann greiðir víðari frá, at um limir teirra høvdu eins gott arbeiðsumhvørvi og aðrir starvsbólkar, kundu 62.000 fleiri fólk verið á arbeiðsmarknaðinum í Danmark. Fólk, sum nú sita niðurslitin heima og fáa hjálp frá tí almenna.

- Tí eru okkara fremstu avbjóðingar rættiliga greiðar: Førleikamenning og arbeiðsumhvørvi noyðast at vera ovast á dagsskránni fyri okkara felag. Tí, samstundis sum eg sjálvandi ynski, at limirnir fáa góða løn, hevur tað líka stóran týdning, at teir hava eitt gott lív, sigur Poul Erik Skov Christensen.